# Børn skulu byrja í skúla eitt ár fyrr

**- Flyta vit skúlaaldurin eitt ár niður, høvdu vit vunnið tað fleirfalt aftur, heldur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum**



FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Helena Dam á Neystabø heldur vit eiga at gagnnýta tær lærumøguleikar, sum seks ára gomul børn hava.

Tað førdi hon fram í Løgtinginum, tá ið aðalorðaskiftið var í Løgtinginum um føroyskt mál.

Landsstýriskvinnan helt, at í hesum sambandi eigur Løgtingið at semjast um um, at fólkaskúlin er tað økið, sum størsti denturin eigur at verða lagdur á í royndunum at tryggja málinum eina framtíð.

Ogein viðkomandi spurningur í hesum sambandi er, nær børnini skulu byrja í skúlanum og her helt landsstýriskvinnan, at vit kunnu akkurát gera sum onnur lond hava gjørt og lata børnini byrja í skúla, tá ið tey eru seks ára gomul, altso eitt ár fyrr enn tey gera nú.

- Vit kunnu skipa fyri, at lata børnini byrja í forskúla tá ið tey eru seks ára gomul, segði hon.

*- Fimm, seks ára gomul børn læra mál hundrað ferðir betri enn tey eldru og tað eiga vit at gagnnýta, heldur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum*

- Vit vita, at tá ið børn eru fimm ella seks ára gomul, taka tey serstakliga lætt ímóti lærdómi, tí tær læra mál hundrað ferðir betri enn eldri. Og tað er klárt, at vit skulu gera gagn av tí næminum, børnini hava í tí aldrinum.

- Eg haldi, at fluttu vit skúlaaldurin eitt ár niður, høvdu vit vunnið tað fleirfalt aftur.

Hon sigur sigur, at hetta merkir ikki at so lítil børn skulu fáa gamalsliga pultsundirvísing í høvdið.

- Men tey eiga at fáa rætt til at koma í eitt umhvørvi, har tað ber til at læra um mál, um tøl og um framburð, segði Helena Dam á Neystabø.

# Vænta nógvar frískúlar afturat í Føroyum

**Ætlanin at niðurleggja skúlar og leggja skúlar saman í størri eindir, kann fáa ótilætlaðar og dýrar avleiðingar, heldur Kommunusamskipan Føroya**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kommunusamskipan Føroya væntar eina mótreaktión upp á ætlanina hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum at miðsavna allan fólkaskúlan í færri og størri skúlar*

*Savnsmynd*

Ætlanin hjá landssýrinum at umskipa fólkaskúlan, so at vit fáa færri og størri skúlar, fer helst at føra til at vit fara at fáa nógv fleiri frískúlar í Føroyum

Tað heldur Kommunusamskipan Føroya.

Kommunuskipanin hevur eina greiða meining um ætlanina, sum Helena Dam á Neystabø hevur lagt fram um at umskipa føroyska fólkaskúlan, so at fleiri skúlar verða niðurlagdir og samanlagdir fyri at vit skulu fáa færri, men størri skúlar.

Eitt endamál við ætlaðu umleggingunum hjá samgonguni er at spara pening og at hesin peningur skal brúkast til onnur átrokandi og námsfrøðilig endamál, sum í dag ikki verða raðfest nóg frammaliga í fólkaskúlanum.

Hesum tekur Kommunusamskipanin undir við og hon vónar eisini, at so verður.

- Men vit stúra fyri, at hesin peningur longu eru tiknir at fíggja hallið í landskassanum við.

### Nógv fleiri frískúlar

Kommunusamskipanin heldur eisini, at bygnaðarbroytingin og viðførda sparingin kann fáa ótilætlaðar og dýrar avleiðingar.

- Sum eina mótreaktión til stóru skúlarnar, sum ætlanin er at skipa, kann væntast at fleiri smærri frískúlar verða stovnaðir.

- Sum lógin um frískúlar er nú, er lutfalsliga lætt at stovna frískúla, og samstundis er tað greitt, at tað verða landskassin og kommunukassarnir, sum koma at bera bróðurpartin av útreiðslunum.

- Hetta merkir, at tær rationaliseringssparingar, sum bygnaðarbroytingin leggur upp til, kunnu verða mistar at fíggja frískúlar við, sigur Kommunusamskipan Føroya

Kommunusamkipanin heldur, at hetta kann ikki vera meiningin og tí mælir hon mentamálaráðnum til samstundis at endurskoða lógina um frískúlar.




# Ger fólkaskúlan fløktari enn hann er í dag

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kommunusamskipan Føroya ávarar ímóti ætlanini hjá samgonguni at umskipa fólkaskúlan, so at vit fáa færri og størri skúlar. Tað fer at gera viðurskiftini upp aftur fløktari og ógreiðari enn tey longu eru nú.

Tað sigur Kommunusamskipanin í eini viðmerking, til uppskotið, sum Helena Dam á Neystabø fyrireikar at leggja fyri Løgtingið.

Kommunusamskipanin tekur undir við yvirskipaða námsfrøðiliga og fíggjarliga endamálinum.

Men sum uppskotið liggur nú, hevur tað so nógvar bygnaðarligar og fólkaræðiligar vansar og skeivleikar við sær, at fólkaskúlin verður uppaftur fløktari, hvat uppgávu- og ábyrgdarbýtið viðvíkur.

- Talan er um so grundleggjandi viðurskifti, at Kommunusamskipan staðiliga ávarar ímóti at leggja fyriliggjandi uppskot fyri tingið, tíansheldur at samtykkja tað.

Eitt, sum Kommunuskipanin átalar, er, at ætlanin er at umskipa skúlabygnaðin, áðrenn greitt er, hvussu ætlaði kommunubygnaðurin skal síggja út.

Tí fer nýggi skúlabygnaðurin helst ikki at samsvara við nýggja kommunala bygnaðin.

Kommunusamskipanin heldur, at kann ætlanin at umskipa skúlan ikki bíða eftir ætlanini at broyta kommunubygnaðin, fer skúlin fyri tað mesta at verða skipaður sum kommunal samstørv.

- Í dag er fólkaskúlin tvíbýttur millum land og kommunur, og hetta er við til at skapa eitt ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti á fleiri økjum, staðfestir Kommunusamskipanin.

Verða kommunurnar nú tvingaðar at samstarva tvørtur um kommunumark, verður uppgávubýtið herheftir trýbýtt ímillum landið, kommunurnar og tað kommununala samstarvið.

Kommunusamskipanin metir, at hetta verður at gera skipanina uppaftur ógreiðari.